# RÁÐU Í HOND



**VEIÐIKVINNA**

*– Tað er ordiliga skeg at fiska, sigur 5 ára gamla Sigrid Sóleyardóttir Hórðará úr Vestmanna. Her er hon saman við hinum børnunum í dagstovninum og fiskar við byrgingina á Mýrunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Komin niðan til ovastu byrgingina, vóru tráðurnar gjørdar klárar. Sigrid var eisini í ferð við hetta sama.

– Tað er babba sum hevur gjørt mær tráðuna, sigur Sigrid, ikki sørt errin. Hetta er ein stutt, men fín tráða við bæði húki og einum floti.

Eitt av starvsfólkunum hevði ómakað sær at fáa fatur á nøkrum maðkum beint við vatnið. So var tað í øllum førum ikki eftir.

## Tað er babba sum hevur gjørt mær tráðuna

Nú ráddi bert um at fáa maðkin á húkin, og so kundi Sigrid kasta útí.

### Onkran fisk

Sigrid var ikki heilt greið um, hvat hon kundi vænta sær av fongi her í vatninum. Men at tað fór at verða til okkurt slag av fiski, var hon ikki í iva um.

– Eg haldi, at tað er síl, kemur tað stillisliga frá henni.

Hetta er als ikki fyrstu ferð, at Sigrid roynir seg við tráðu. Hetta hevur hon gjørt so mangan áður.

Saman við foreldrunum og lítlu systir síni og stórabeiggjanum, hevur hon onkutíð fiskað á kajini í Vestmanna. Og her kom hon ofta aftur við fongi.

– Har vóru nógvir fiskar, greiðir hon frá.

### Í botni

Tráðurnar vóru gjørdar eftir støddini á børnunum, so tær rukku ikki so langt úti. Men løtu eftir vóru kortini omanfyri 10 tráður í vatninum.

Her var tað helst meiri viljin til at fanga nakað, heldur enn tað at fanga nakað sum dreiv verkið.

Tað gekk tí heldur ikki so leingi, fyrrenn tað beit á hjá tí eina barninum. Øll vendu sær spent yvir ímóti viðkomandi, meðan onkur slepti tráðuni og fór eftir einum glúpi.

– Jubiii, rópa børnini. Endiliga fekk onkur okkurt.

Men fiskieydnan var ikki til staðar beint tá. Heldur hinvegin. Her var hvørki síl ella laksur á húkinum, tí fast stóð í botni.

Skjótt var at fáa loyst húkin aftur, og løtu seinni var ein spraklandi maðkur aftur undir vatnskorpuni.

– Hetta er ordiliga skeg, sigur Sigrid.

*snorri@sosialurin.fo*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Fingu einki

*Hóast tey roynd og royndu, so fingu tey einki síl heimaftur við sær ella til grillina. Hetta tók kortini ikki mótið ella ferðarhugin frá børnunum. Tey brúktu ístaðin tíðina at hugna sær saman, fanga kombikk og síðani at eta tann góða grillmatin. Hóast alt, var hetta ein minniligur dagur við byrgingina við Vatnið.*